# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Minningarorð um Óluvu Hentze

**f. 23. okt. 1949, deyð 7. juni 2009**

Henda siglingsferð hjá Óluvu er liðug og alt, alt ov stutt hon gjørdist. Svárt nívir sorgin, og »alt í sor og sorli er.« Í líðingini ásanna vit neyðarsliga, at endin longu er í byrjanini, at verður okkum lív givið, er deyðin hjástaddur. Hetta er okkara grundvøllur, og eru tað nøkur, ið komu at smakka hetta lívskrav, so vóru tað Óluva og hennara avvarðandi. Sníkjandi kom sjúkan og stríðið byrjaði – ikki eitt stríð, ið noktaði sjúkuna, men eitt stríð, ið møtti sjúkuni, sum ein part av lívinum. Slíkt krevur mót, ja, tað krevur lívsmót, og var tað nakað ið eyðkendi Óluvu, so var tað lívsmót.

Hetta fingu vit at kenna frá fyrsta degi, hon traðkaði inn á Almannastovuna, og nú vit hesa síðstu tíðina vóru fráskild vegna sjúkuna, men fingu høvi at fylgja við á síðulinjuni á blogginum.

Og í sorgini dagar sólin í eystri, har Óluva fryntlig tekur ímóti í móttøkuni á Almannastovuni.

Blíðlátin samskiftir hon við fólk í dýrastu neyð, og í eygu hennara skilja tey, at samrøða teirra verður fatað. Hon tekur ímóti fólki, ið koma á fund. Starvsfelagar venda sær til hennara. Alt hetta verður gjørt við fakligari professionalismu, ið sýnir, at hetta er ein partur av lyndinum. Har hon stígur, er hugni, og á vegnum verður prýðað.

Eingin ivi er um lívsins meining. Vit eiga at taka ábyrgd av egnum lívi, men tey, ið av eini ella aðrari



grund ikki megna hetta, skal hond takast um. Familjan er miðdepilin, men er hon viðbrekin uttan arbeiði og menniskjaliga felagsskapir.

Hetta vóru ikki bert meiningar. Vit sóu tað eisini í verki. Óluva elskaði sína familju, og hon visti eisini, at hon var elskað. Skjótt var tað, at vit hoyrdu um og sóu Henrik, og á borðinum stóðu myndir av børnunum og ommubarni. Vit fingu at vita um týdningin um tað andaliga lívið, og fyri Óluvu var kirkjan týdningarmikil klettur í samfelagslívinum. Kirkjan skuldi umboða lívsins vakurleika. Men tað vóru eisini aðrir felagsskapir, ið høvdu týdning. Her lá fótbólturin frammarlaga, og mangar hava frásagnirnar verið frá túrum við fótbóltlandsliðinum. Og Óluvu líkt var einki hálvt, men alt heilt, so fáur er tann, ið hevur stuðlað landsliðnum eins nógv og hon og maðurin.

Men nú sólin er sett í vestri, nívir sorgin. Til tað síðsta var stríðst – og til tíðir sást lívsvónin í havsbrúnni, men at enda tók sjúkan fastatøkur og køvdi alla vón. Men kenna vit Óluvu rætt, so tók hon ábyrgdina av hesum lívsumstøðum, og sá eisini hetta sum ein part av lívsins innihaldi. At hon gleddist um tað, henni var givið, og her mugu vit leggja aftur, har hon var sólin, ið fløvaði henda gróðrarbúnaða urtagarð. So í allari sorgini, mugu vit ásanna, at vit sita ikki á berum, tí vit hava henda urtagarð, sum Óluva hevur plantað, og í okkum er eingin ivi, at tit, Henrik, Sjanna og Tórur fara væl um tær blómur, sum tit saman hava gróðursett. Og tá ið alt tykist í sor og sorli at vera, tá setast vit í urtagarð, har troystarsangur okkum fer at ljóma.

Óluva, hvíl í friði, og Henrik, Sjanna og Tórur, má lívsins blóma fylgja tykkum.

**Blíðar heilsanir**
**Starvsfólk á Almannastovuni**

## Nýtt føroyskt blað




*Bergur Dalsgaard við blaðnum Krossorð sum hann ritstjórnar*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Nýtt blað er komið á føroyska marknaðin. Talan er um blaðið "Krossorð", sum Bergur Dalsgaard gevur út.

Í blaðnum eru nógvar ymiskar uppgávur, so sum krossorðagátur, sudoku, finn orð og mangt annað.

Bergur Dalsgaard er úr Havn og búsitandi í Danmark, har hann arbeiðir sum sjálvstøðugur grafikari. Bergur sigur, at hann hevur altíð havt stóran áhuga fyri krossorðum og tílíkum uppgávum og hann hevur m.a. gjørt krossorð til Barnablaðið og Dimmalætting. Góðir vinningar eru eisini at fáa, t.d. allar Harry Potter-bøkurnar og árshald til Dimmalætting.

Krossorð kann keypast í sølubúðum kring alt landið. Blaðið er 32 síður og kostar 30 krónur.

## Bachelorar fingið prógv

Fríggjadagin 3. juli fingu á Fróðskaparsetri Føroya, Søgu- og samfelagsdeildini, 10 bachelorarprógv handað (9 bachelorar í stjórnmálafrøði og ein bachelorur í søgu/Jóhanna V. Joensen).

**Aftara rað f.v.:** Kristoffur Laksá, Jens Hákun Leo, Pól Espern H. Hansen, Janus á Ryggi og Kristian Joensen.

**Fremra rað f.v.:** Runa Preeti Høgnesen, Jóhanna V. Joensen, Lena Fríðunn á Ørg og Marin Katrina Frýdal. Á myndini vantar Jan Lamhauge



†

### Andlát og jarðarferðir

**Aksel Fredag Østerø av Skipanesi** andaðist á Eysturoyar Røktar- og ellisheimi leygardagin, 69 ára gamal. Kistan fer úr Røktarheiminum í Runavík týsdagin kl.18. Jarðarferðin verður úr Elim mikudagin kl. 14. Tey, ið vilja minnast Aksel, kunnu lata Elim eina peningagávu, konta í peningastovnunum.

**Red Hjelm**, ættaður úr Vági, búsitandi í Danmark andaðist leygardagin, 49 ára gamal.

### Dagurin

14. juli. Bonaventura, deyður í 1274. Hann var úr Italiu og æt upprunaliga Giovanni Fidanza. Halgisøgan sigur, at tað var sjálvur hin heilagi Frans, sum gav honum navnið Bonaventura, ið merkir eydnurík hending. Bonaventura varð seinni biskupur í Albano, og hann gjørdist ein tann mætasti lærumeistarin hjá katólsku kirkjuni í miðøld.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*